## DAGSINS MEINING

# Grannasamstarv

Ísland og Føroyar hava gjørt avtalu um búskaparligt samstarv. Vit kenna ikki avtaluna í smálutum, men sum skilst er talan um eina EBS líknandi avtalu. Hetta merkir, at vørur, tænastur, kapitalur og fólk kunnu flytast frítt millum bæði londini.

Tað er sjálvsagt, at føroyingar samstarva við grannarnar fyri norðan. Ísland og Føroyar hava gomul søgulig bond, okkara mentanir eru á mangan hátt líkar, og vit eru sum sagt av næstu grannum. Tjóðirnar hava ymiskar vinnur, so einki er at ivast í, at føroyskar fyritøkur hava nógv at vinna við at økja um útflutningin til Íslands. Talan er sjálvsagt um vinnuøki, har vit eru á odda, eitt nú innan fiskivinnutøkni og framleiðslu av ávísari fiskiveiðiútgerð. Men hví ikki royna onnur øki við, har føroyskar fyritøkur eru frammalaga eitt nú innan kunningartøkni og byggivinnu? Vit kundu eisini nevnt bryggjaríini, ið framleiða øl og sodavatn á hægsta altjóða dygdarstøði.

Hvat kapitalflutningi viðvíkur stingur vanligi óttin fyri, at íslendskar fyritøkur, skulu kunna yvirtaka føroyskar fyritøkur, seg upp so av og á, og hesin óttin fer ikki at minka av avtaluni. Til hetta er í fyrsta lagi at siga, at alivinnan er tryggjað við einum føroyskum fyrivarni, um forðar útlendskum fyritøku í at eiga meira enn 30% av partapeninginum í føroyskari alifyritøku. Í øðrum lagi er at siga, at soleiðis eru nú einaferð treytirnar í nútímans altjóðagjørdum búskapi. Tí vinnulívið, ið ikki kann liva upp til hesar treytir, er ikki lív lagað í tí marknaðarbúskapi, sum ræður í øllum heimurin í dag, har sjálvt kinverjar eru meira ella minni farnir yvir til marknaðarbúskap. Hartil kemur at einki forðar føroyskum fyritøkum at gera íløgur í Íslandi.

Avtalan hevur aðrar fyrimunir og tykist lata upp fyri einum víttfevandi samstarvi innan útbúgving og mentanarsamstarv. Hetta er at fegnast um, og vit vóna at føroyskir ungdómar fara at nýta høvi at søkja til íslendskar lærustovnar í styttri ella longri tíðarskeið. Tað er alt vorðið meira vanligt at lesandi taka partar av eini útbúgving í øðrum landi. Avtalan skuldi givið eitt gott høvi hjá ungum føroyskum lesandi her ella í Danmark at roynt seg eina tíð í Íslandi. Somuleiðis er at vóna, at ungir íslendingar fara at koma hendan vegin at lesa í styttri ella longri tíð. Ein fortreyt fyri, at hesir møguleikar kunnu troytast, er, at tað verða skaptir fíggjarligir møguleikar fyri hesum, og hetta eiga báðar stjórnir tí at umhugsa sum skjótast. Avtalan skal samtykkjast á altingi og á løgtingi og tað er at vóna, at hetta hendir uttan trupulleikar. Vit kunnu so bara fegnast um, at landsstýrið og tað vil siga løgmaður sum umsitur hetta málið, saman við sínum fólkum hava gjørt eitt gott arbeiði.

**Sosialurin**

# Semingsmenn!!

**Hanna Lisberg**
*Fyrrv. Skrivari í F.A.*



Tá undirritaða dittar sær at skriva um semingsmenn, so kemur hetta lutvís av, at útvarpsmaður spurdi løgfrøðing, um semingsmenn fingu nakra upplæring!

Sjálv havi eg í mong ár sitið í samráðing um sáttmála - og sostætt eisini við semingsmenn. Tann fyrsti, sum eg kendi, var sýslumaðurin Gunnar Dahl Olsen. Hann hevði hjálparmann, sum hann lærdi upp. Gunnar D. Olsen var ein sera góður semingsmaður. Strangur var hann á tann hátt, at hann kravdi nógv. Fyrst av sær sjálvum so okkum báðum pørtum. Fyrsta dagin, hann kom uppí bað hann um úrslit av samráðingum. *"Nei, hini gomlu, je vil síggja úrslit av realitetssamráðingum."* Vit fingu alt aftur í høvdið. *"Setið tykkum at arbeiða við realitetssamráðingum." Tá hann so kom aftur dagin eftir, "jú eitt sindur er hent, men alt ov lítið, tó hetta er byrjan." Báðir partar fingu so nøkur orð við G.D.O. "Minnist til, at tá ósemjan er av, og tit hava slakað eitt sindur báðir partar, so kemur dagligi dagurin aftur - tá eru báðir partar greiðir yvir, at tit hava brúk fyri hvørjum øðrum."* Vit fingu eitt semingsuppskot fyri og annað eftir - til vit at enda samdust. Takkað veri einum góðum semingsmanni. Einki verkfall.

Annar semingsmaður; Jóannes Rasmussen, jarðfr. Eisini sera góður semingsmaður, sum kom við einum semingsuppskoti fyri og øðrum eftir. So vóru: Bjarni Mikkelsen og Sverri Egholm, báðir dúgligir semingsmenn. Men allarbesti av øllum semingsmonnum, eg kenni var Dánjal Bærentsen, sum tá var einsamallur djóralækni í landinum. Hann gjørdi greitt yvir fyri landsstýrinum, at nú hevði hann tikið av og var semingsmaður burtur av, tá hann varð boðsendur. Djórlæknatænastan lá lamin, meðan semingsfundirnir vóru! T.d. hendi tað, at ein kúgv var ógvuliga sjúk. Bóndin fekk at vita, at hann skuldi drepa kúnna, um hon var so sjúk at hon leið. Og so var. Júst tí arbeiddi Dánjal so harðt; vit sótu í dagavís - og eingin slapp at hava samband við nakran uttanfyri fundarhølini. Eg føli trongd til at takka Dánjal Bærendsen fyri, hvussu íðin hann var - at fáa eina loysn, sum hann eisini fekk. Meðan semingin fór fram, var tað sera tungt - mat fingu vit, men ongan svøvn.

Eg skilji, at bæði Jógvan Sundstein og Jógvan Ámundsson hava ella hava havt sama framgangshátt. Í útvarpinum hoyrdi eg teirra góðu frásagnir og svar.

Høvuðsuppgávan: semingsuppskot - ikki bara eitt, nei semingsmenn mugu virða báðar partar og ikki tveita frá sær, tá eitt uppskot fellur og spæla fornermaðir og hótta við uratkvøðu. Teir hava ikki skilt uppgávu sína rætt. Nei, teir eiga at halda fram. Persónliga kenni eg ikki hesar báðar, men eg giti, at teir hava ov lítlar royndir. Tað er eingin skomm at spyrja undanfarnar semingsmenn um ráð. "Go on, go on" við semingsuppskotum og fari virðiliga fram mót báðum pørtum.

Ein av teim mongu arbeiðsgevarum, sum eg hevði stóra virðing fyri, er nú komin væl til árs - og sendi eg honum alt tað besta, nú ið árini eru so mong. Tygum høvdu mangt gott orðið til okkara, og tá tygum fyltu 25. apríl fingu vit lagkøku og kaffi á Hafnia. Takk fyri.

# »Lygn! Lygn! Lygn!« mjarrar Høgni í sama lag

**Hans Pauli Strøm**
*javnaðarmaður*



Tað er blivin ein ringur vani hjá Høgna Hoydal at kalla tey fyri lygnarar, hann er ósamdur við. Tað ber snøgt sagt ikki til at hava aðrar meiningar enn hann, so rópar hann "Lygnari!", men sjálvur er hann reinur sum nýsleiktur kálvur.

Sum ikki einaferð kallar hann meg fyri lygnara nú í einum aftursvari til ein greinastubba, eg skrivaði um ágangin móti arbeiðarafeløgunum, sum eru í verkfalli, eisini frá tjóðveldismonnum.

Høgni kann sjálvsagt vera ósamdur - tað er jú ein politisk meting - men tað er tíverri ikki nøkur lygn, at Tjóðveldið stingur arbeiðarafeløgini í ryggin við sínum atburði hendan síðsta mánaðin. Eg nevndi sum dømi m.a. atburðin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, skrivingina hjá formanninum í Unga Tjóðveldinum og skrivingina hjá tjóðveldisblaðnum Fregnum.

Høgni sigur at eg lúgvi, tá eg sigi, at hann hevur kallað lønarkrøvini ábyrgdarleys. Men tað var ikki tað eg skrivaði. Eg skrivaði at hann "gevur sínum landsstýrismanni sín fulla stuðul, tá hesin fer í part við arbeiðsgevarunum og kallar lønarkravið hjá arbeiðarafeløgunum ábyrgdarleyst". Tað er tíverri ein sannroynd, at nú Karsten Hansen hevur verið í andglettinum, hevur Høgni fleiri ferðir givið Karsteni sín fulla og treytaleysa stuðul, ja róst honum til skýggja.

Høgni sigur at eg lúgvi, tá eg sigi at Tjóðveldið hevur blakað ábyrgdina fyri fyrsta sjúkadegi frá tí almenna yvir til fakfeløgini og arbeiðsgevarar at berjast um. Hann sigur at teir við lóg hava álagt arbeiðsgevarum at gjalda henda fyrsta sjúkadagin. Veruleikin er, at bæði sambært fakfeløgunum og arbeiðsgevarunum elvir hetta til øktar trupulleikar í samráðingunum, tí tá ið arbeiðsgevarar júst hava fingið álagt eykakostnaðin av fyrsta sjúkadegnum, vilja teir sjálvsagt royna at draga tað innaftur í lægri lønarkostnaðum. Við tí úrsliti - sum eg skrivaði - at uppaftur størri munur verður millum partarnar.

Tá ið Høgni hevur roynt at vart seg og flokkin, nú teir eftir 5 ára samstarvi eru etnir upp av Fólkaflokkinum, hevur hann víst til tann verkamanna- og fiskimannaflokkin, sum Tjóðveldisflokkurin var í 50-unum. Høvdu teir heldur tikið tann tráðin uppaftur, enn verið so upptiknir av at føra góðan fólkafloks-politikk, so høvdu aðrir tónar veri at hoyrt frá Tjóðveldisflokkinum í hesum døgum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Tøl ið tala

**Arbeiðarafeløgini í verkfalli**

Helvtarmunur er á vøkstrinum í eini arbeiðaraløn og vøkstrinum í BTÚ, so arbeiðsmannalønin er ikki farin við lønarvøkstrinum í føroyska samfelagnum, men arbeiðarastættin kann skoða eina gjógv millum stættirnar, sum sigur, at BTÚ er vaksið við 107% síðani 1985, meðan arbeiðaralønin sama tíðarskeið bert er vaksin við 59 %

Almennu tølini tala fyri seg, tá tað skal dokumenterast, at tað er ikki tímalønti arbeiðarin, sum er farin við lønarvøkstrinum seinnu mongu árini. Hinvegin prógva tølini, at arbeiðarin heldur hevur verið við sviðusoð og ikki hevur fingið lut í vøkstrinum í BTÚ - bruttotjóðarinntøkuni - sum er vanligi málistokkurin fyri vinnuliga inntøkuskapanina í samfelagnum.

Longu tíðliga í kjakinum um lønarvøkstur eydnaðist arbeiðsgevarunum at geva fólki ta fatan, at arbeiðsfólk hava fingið størri lønarhækkan, enn onnur, men hetta er so langt frá veruleikin og er langt av leið og tað prógva tølini.

Arbeiðsgevararnir nýttu hetta í stóran mun sum høvuðsargument fyri at siga, at arbeiðarafeløgini ikki eiga at koma sær at biða um meira í løn, men tølini skjóta hol í argumentini hjá arbeiðsgevarunum.

Eftirkannar ein tølini, so er myndin ein onnur og arbeiðarin er við sviðusoð.

Tøl og talvurnar niðanfyri vísa hetta, men lat okkum greiða frá tølunum og talvunum.

Arbeiðsbólkarnir, sum nevndir eru, eru arbeiðsbólkar, sum Hagstova Føroya vanliga nýtir at gera samanberingar við. Arbeiðsmannaløn, handverkarar, starvsfólk (8. lønarstig) og tænastumenn (35. lønarstig). Hetta eru stig, ið ikki eru høgt á lønarstiganum. Og tølini eru við eftir- og frítíðarløn og eisini víst uttan eftir- og frítíðarløn. Á myndunum (grafunum) eru tølini tó við hesum).

Tølini vísa munin í krónum og oyrum og siga ikki so lítið.

Byrjað verður í 1985, tí starvsfólk í føstumstarvi og við fastari løn fóru niður í løn í 90'unum, tá kreppa var. Farast má aftur um kreppuna, fyri at fáa rættvísa mynd. Fastlønt fóru niður í løn og eftirløn, meðan tímalønt á pappírinum høvdu óbroytta tímaløn, men í veruleikanum mistu arbeiði og tað sæst ikki í turru tølunum.

Líkamikið hvussu tølini verða vend,so er munurin millum arbeiðaralønir og aðrar lønir vaksin - eisini, ella kanska serliga, seinnu árini.

Talvan við BTÚ og arbeiðaralønum vísir, at BTÚ veksur við ferð í mun til arbeiðaralønina. Og staðfestast kann, at arbeiðarin er ikki farin við lønarvøkstrinum.

Vil ein gera alt heilt skilligt, so ber til at rokna í prosentum og tá siga tølini, at BTÚ frá 1985 til 2002 er vaksið við 107 %. Arbeiðsmannalønin er sama tíðarskeið bert vaksin við 59 %.

Viðmerkjast skal, at arbeiðarafeløgini meta, at nevndu lønarbólkar eru komnir á eitt støði, sum er rímuligt, men at gjógvin til arbeiðaralønina er ov breið og er vaksandi, og tað kann ikki góðtakast.




Samanbering millum Bruttotj ar rt¿ku pr. b gva
og Arbei aral¿nina,
rokna fr t ar- og eftirl¿n

# Nýggj støða: arbeiðsgevarar virknari leikut í tiltøkum

**Arbeiðarafeløgini í verkfalli**

Nú raka arbeiðsgevararnir meint við sínum tiltøkum, t.d. leggja arbeiðsgevararnir strandferðsluskipini

Tiltakið hjá arbeiðsgevarunum, við Arbeiðsgevarafelagnum á odda, har teir hava latið aftur heilsølur og oljusølur/bensinstøðir, gevur eina nýggja støðu í verkfallinum.

Arbeiðsgevarar hava nú virknari leiklut í verkfallstiltøkunum. Arbeiðsgevararnir hava við sínum tiltøkum læst støðuna sera fasta.

Nú eru tað ikki arbeiðarafeløgini í verkfalli, sum við sínum verkfalls-forðingum gera, at vøra og brennievni ikki fæst kring landið, men arbeiðsgevararnir, sum hava latið virkir og heilsølur aftur.

Arbeiðarafeløgini royndu við hóvsemi at bera so í bandi, at tiltøkini skuldu ikki raka tey veikastu, eittnú gomul og sjúk. Eisini gjørdu feløgini alt fyri, at ferðafólkafluttningur t.d. við strandfaraskipum, skuldi ikki steðga. Alt hetta hevur havt við sær eina rúgvu av undantøkum og eisini nógva umsiting av hesum.

Nýggja støðan hevur við sær, at arbeiðsgevararnir hava tikið sær leiklutin sum leiðandi parturin viðvíkjandi verkfallstiltøkum. Tessvegna er sera trupult hjá arbeiðarafeløgunum at gera av, hvussu verkfallstiltøkini raka og hvørji undantøk kunnu gerast veruleiki. Bólturin hesum viðvíkjandi liggur hjá arbeiðsgevarunum.

Ein avleiðing av nýggju støðuni tykist vera, at strandfaraskip verða løgd. Tað eru tað als ikki arbeiðarafeløgini í verkfalli, sum vilja hetta, men arbeiðsgevararnir. Tað eru teirra tiltøk, sum nú raka meint.

FAG leggur strandferðsluskipini

Arbeiðarafeløgini hava lagt dent á, at eittnú ferðafólkaflutningur skal ikki tarnast av verkfallinum. Um arbeiðsgevararnir fara at vísa somu atlit er ilt at siga, men hetta sær ikki út til at vera støðan. Nú frættist, at ein avleiðing av tiltøkunum hjá arbeiðsgevarunum er, at Smyril verður lagdur sunnudagin. Arbeiðarafeløgini hava roynt at verið smidlig og funnið møguleikar og kunnu t.d. vísa á, at strandferðsluskip, t.d. Smyril, kann bunkra við oljukeiina í Havn, um vilji er at varðveita samferðsluna sjóvegis.

Nýggja støðan hevur óivað við sær, at tyngri verður at fáa verkfallsraktu samfelagshjólini at mala, men skuldina hava arbeiðsgevararnir, sum hava tikið sær virknan og herðrendan leiklut í verkfallstiltøkunum, og Føroya fólk merkja longu tiltøk teirra.

Verkfallsstøðan er altíð óheppin og rakar á ymsan hátt, men tiltøkini hjá arbeiðsgevarunum gera bert støðuna óliðiligari. Hvørt Arbeiðsgevarafelagið fer at vísa somu samfelagsatlit, sum arbeiðarafeløgini hava við undantaksloyvum og hóvsemi, vil tíðin vísa. Arbeiðsgevararnir spæla nú leiklutin sum verkfallsvirknir leikarar í femstu røð á samfelagspallinum, ein leiklutur, ið krevur skynsemi og ábyrgdarkenslu.

# Lønarlag í londum kring okkum

**Arbeiðarafeløgini í verkfalli**

Vanliga sammeta vit í Føroyum okkum við lond sum Ongland, Danmark, Noreg, Finnland og Frankaríki.

Sambært tølum hjá International Lønstatistik, so er lønarhækkingin í hesum londum í 2002 millum 4 og 5 prosent. Tølini eru fyri 4. ársfjórðing í 2002.

Tað er Dansk Arbejdsgiverforening, sum letur hesi tøl úr hondum.

Danska lønarhækkingin nevnda tíðarskeið er uppá 4,6% og í Noreg er hækkingin 5%.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur sagt seg vilja laga seg eftir miðallønini í Europa og hevur bert boðið føroyska arbeiðaranum eina hækking uppá 3,4%.

# Opið bræv til Karsten Hansen, landsstýrismann

**Hanna Lisberg**
*Tórshavn*

Hvussu nógv kostaðu stólarnir í tinghúsinum hvør? Ger so væl at svarða her í blaðnum.